


STARVSLÝSING

# Verkfrøðingar til Landsverk [endurlýsing]

Vegna ov fáar umsóknir verður søkt á nýggjum eftir tveimum verkfrøðingum – einum til vegadeildina og einum til framleiðsludeildina hjá Landsverki at byrja skjótast til ber. Vit kunnu bjóða spennandi og áhugaverd størv, ið eru fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

## Verkfrøðingur til vegadeildina

### Arbeiðsuppgávur

Uppgávur, sum tú í høvuðsheitum skal røkja, fevna eitt nú um:

- Planlegging
- Prosjektering
- Programmeringar, forkanningar, prosjektgransking av vega-, brúgva- og tunnilsprosjektum
- Eftirlit við verkætlanum
- Gera ætlanir fyri ferðslutrygdartiltøk
- Myndugleikaumboðan
- Luttaka í norðurlendskum samstarvi innan økið

### Førleikakrøv

Vegadeildin sóknast eftir verkfrøðingi við royndum innan omanfyri nevndu arbeiðsøki. Royndir at arbeiða við KT-forritum á brúkarastøði er ein fyrimunur. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, so sum góð samstarvsevni, at tú arbeiðir sjálvstøðugt og kann skipa títt arbeiði, er førur fyri at eggja og ganga undan, er miðvísur og kann geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum. Tú skal eisini vera opin fyri at starvið broytist. Viðkomandi skal eisini kunna røkja aðrar uppgávur á stovninum, enn tær omanfyri nevndu.

## Verkfrøðingur til framleiðsludeildina

### Arbeiðsuppgávur

Uppgávur, sum tú í høvuðsheitum skal røkja, fevna eitt nú um:

- Yvirskipaða raksturin av skervverkunum saman við formonnunum á verkunum kring landið.
- At skipa fyri viðlíkahaldi og dagføring av verkunum kring landið.
- Gera kostnaðarmetingar og eftirkalkulatiónir av asfalt- og verklagsarbeiðum.

### Førleikakrøv

Framleiðsludeildin sóknast eftir einum fólki við útbúgving sum verkfrøðingur ella aðrari viðkomandi útbúgving. Viðkomandi skal hava áhuga at arbeiða við KT. Royndir við at arbeiða við Excell-rokniarki og Word er ein fyrimunur. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, so sum góð samstarvsevni, at tú arbeiðir sjálvstøðugt og kann skipa títt arbeiði, er førur fyri at eggja og ganga undan, er miðvísur og kann geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum. Tú skal eisini vera opin fyri at starvið broytist.

### Setanarviðurskifti

Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmálanum ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Umsóknir

Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verða at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postmoga 78,
FO–110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 13. februar 2007. Merk umsóknina „Verkfrøðingur til vegadeildina" ella „Verkfrøðingur til framleiðsludeildina" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið á vegadeildini kunnu fáast við at venda sær til Heina Eysturoy, deildarleiðara, á fartel. 540 881 ella teldupost he@lv.fo

Nærri upplýsingar um starvið á framleiðsludeildini kunnu fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðara, á fartel. 540 841 ella teldupost to@lv.fo

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur, byggiharrauppgávur og flogvallamál.*

*Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

LANDSVERK
*byggir land*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo